# Todi og Christian Høgni aftur í eldin



*Christian Høgni er sera væl upplagdur í løtuni*

**Í Danmark er miðvikuumfar á skránni, eftir at kappingarnar í vikuskiftinum hildu frí, tí EM undankappingardystir vórðu spældir**

**DANMARK**
*Jóannes Hansen*

Christian Høgni Jacobsen var fremsti maður á landsliðnum leygardagin. Sunnudagin fór hann aftur til Danmarkar og Vejle. Í gjárkvøldið var nýtt umfar í 1. deild á skránni. Vejle skuldi á útivølli spæla ímóti FC Aarhus. Tá blaðið fór til prentingar, var dysturin ikki spældur.

Í morgin venda vit aftur til, um fremsti maður á landsliðnum var í Vejle álopinum, ella um hann var á vongverjanum, har hann var, tá Vejle síðst spældi. Undan dystinum var greitt, at Peter Degn, sum Vejle hevur leigað í Brøndby, og sum hevur verið eitt sindur skaddur, síðani hann skifti felag, fór at vera tøkur.

Í Veje vilja teir fegnir vera við í kappingini um tey bæði fremstu plássini og harvið uppflytingina til superliguna. Tá teir spældu seinast, snávaðu teir orduliga. Teir høvdu sunnudagin 1. september vitjan av Fredericia, sum altíð hevur verið mettur sum fótbóltsligi lítlibeiggin í tríkantsøkinum, men Fredericia vann 1–0 í Vejle.

## Meiri pláss til Toda

Á landsliðnum hevur Christian Høgni Jacobsen seinast stóra árið verið í plássinum, sum Todi Jónsson frammanundan var sjálvskrivaður til. Todi heldur framvegis fyribils frí frá landsliðsfótbólti.

Superligan hevði frí í vikuskiftinum. Danmark spældi EM undankappingardyst í Oslo.

Í kvøld fer bólturin aftur á rull í superliguni. Øll fjúrtan liðini skulu í eldin. FCK skal spæla á útivølli í Esbjerg. Teir vóna, at tað skal hilnast betur, enn tað gjørdi, tá FCK seinast var í Jyllandi. Tá taptu teir 3–0 í Aalborg.

Fyritreytirnar undan dystinum í Esbjerg eru ikki tær bestu. Fýra av spælarunum, sum plaga at vera á liðnum, eru ikki tøkir. Málverjin Magnus Kihlstedt er skaddur og verður ikki við tann næsta mánaðin. Og harafturat eru tríggir spælarar leikbannaðir, tí teir sóu gult og reytt í Aalborg. Talan er um verjuspælaran Bo Svensson, miðvallaran Erik Mykland og álopsspælaran Sibusiso Zuma.

FCK liðformaðurin, Christian Lønstrup, heldur ikki, at teir fyrstu ellivu fara at verða verri fyri, enn teir plaga at vera. Men hann heldur ikki, at tað kann roknast við, at innskiftingar í 2. hálvleiki kunnu verða so avgerandi, sum tær hava verið í fleiri av undanfarnu landskappingardystunum. Tá hava klassaspælarar sitið á beinkinum. Liðformaðurin heldur ikki, at spælaratilfarið er so gott, at tað ikki kennist á beinkinum, tá fýra av teimum bestu eru burtur frá.

At Zuma ikki er við í Esbjerg eigur at gera tað eitt sindur lættari hjá Toda Jónsson at sleppa framat í álopinum. Nú eru teir tríggir, sum kappast um tvey pláss. Umframt Toda er talan um Peter Møller og Jörgen Petersson. Uttan at vit hava fingið nakað sum helst ítøkiligt at vita um tað, so kundi tað hugsast, at Todi verður annar í álopinum, og at annar av hinum báðum verður á beinkinum. Spælistílurin hjá teimum báðum er rættuliga líkur.

Hinir dystirnir í superliguni í kvøld eru hesir: AB–Farum, Køge–FCM, OB–AaB, Silkeborg–Viborg og AGF–Brøndby. Áhugin fyri fótbólti er stórur í Danmark. Tað eru eingi atgongumerki eftir til dystin í Århus, og í Esbjerg roknaðu teir í gjár við, at tey síðstu standiplássini fóru at vera seld, áðrenn Todi og teir koma á vitjan í kvøld.



*At Zuma ikki er við í Esbjerg eigur at gera tað eitt sindur lættari hjá Toda Jónsson at sleppa framat í álopinum*




## Tilboð ynskist

uppá at stoypa nýggja rætt fyri Ytra part í Skálafjalli. Tilfar fæst við at venda sær til Jóan Petur Hansen, 44 15 75, best eftir kl. 17.00. Tilboðini skulu sendast til, Hagastýrið fyri Ytra part í Skálafjalli v/ Jóan Petur Hansen, 485 Skálafjørður.

**Hagastýrið**

## Ársveitsla

Landsfelag Pensjónistanna hevur ársveitslu í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn tann 14. september.

Nærri upplýsingar fáa tit frá tykkara egna lokalfelag.

Tilmelding til tykkara felag seinast 9. september.

**Nevndin**

## Runavíkar-/Tofta kvøldskúli

## skúlaárið 2002/2003

**Royndarfyrireikandi/stakgreina undirvísing á 8., 9. og 10. flokka stigi**

verður í hesum lærugreinum:

| | |
|---|---|
| Føroyskt | Rokning/støddfrøði |
| Danskt | Alisfrøði |
| Enskt | Evnafrøði |
| Týskt | |

Undirvísingin kann enda við próvtøku í juni 2003.

Skeiðini eru treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning myndugleikanna.

Luttøkugjald 400/300 kr.
Goldið verður fyrsta kvøldið.

Tilmelding sum skjótast hjá kvøldskúlaleiðarunum.

**Runavíkar Kvøldskúli** tlf. 448265
**Tofta Kvøldskúli** tlf. 447332

## Skeið

Um nóg nógv tekna seg, verður skeið hildið í okt. í gerð av kortum og myndum
- Seymað
- 3. dv. ella
- serviettum

Meira fæst at vita á tlf. 315191 - 215191 e. kl. 16.

## Onkologisk Ambulatorium 10 ár

Ráðstevna í Norðurlandahúsinum
17. sept. 2002

Krabbamein og viðgerð

| | |
|---|---|
| **09.30-09.35** | Jákup N. Olsen, formaður í Føroya Felag móti krabbameini bjóðar vælkomin |
| **09.35-09.50** | Bill Justinussen, landsstýrismaður í familju - og heilsumálum setir ráðstevnuna. |
| **09.50-10.10** | **Krabbameinsviðgerð í Føroyum** Jón á Steig, yvirlækni á Landssjúkrahúsinum. |
| **10.10-10.40** | **Onkologisk Ambulatorium - frá 1992 og til í dag** Sjúkrasystrar Margret Mortensen, Onkologisk Ambolatorium, Landssjúkrahúsið og Else Carlstedt, Kræftens Bekæmpelse, Danmark |
| **10.40-11.10** | **Steðgur** |
| **11.10-1135** | **Føroya Felag máti Krabbameini og arbeiði tess.** Jákup N. Olsen, formaður í FFK |
| **11.35-12.00** | **Onkologisk konsulenttjeneste på Færøerne.** Hans Skovgaard Poulsen, yvirlækni dr. med., Finsencentrið, Ríkissjúkrahúsið, Danmark |
| **12.00-12.30** | **Kampen mod kræft - nationale kræftplaner og kræftforeninger.** Arne Rolighed, stjóri í Kræftens Bekæmpelse, Danmark. |
| **12.30-13.30** | **Døgurðasteðgur** |
| **13.30-14.00** | **Kræft i Norden med fokus på Færøerne - forekomst, udvikling og forebyggelse.** Hans H. Storm, yvirlækni og deildarstjóri í Kræftens Bekæmpelse, Danmark. |
| **14.00-14.30** | **Nye behandlingsprincipper indenfor kræftbehandling.** Michael Rørth, professari, yvirlækni dr. med., Finsencentrið, Ríkissjúkrahúsið, Danmark |
| **14.30-15.00** | **Steðgur** |
| **15.00-15.45** | **Lindrande behandling - 15 års erfarenhet av palliativ hemsjukvård, sjukhusteam och hospice verksamhet på Island** Valgerður Sigurðardóttir, onkolog dr. med., yvirlækni á palliativari eind á Landspitalinn, Reykjavík. |
| **15.45-16.15** | **At hava verið raktur av krabbameini.** Fyrrverandi krabbameinssjúklingur. |
| **16.15-16.30** | Anne Grete Mikkelsen, læknastjóri á Landssjúkrahúsinum, endar ráðstevnuna. |
| **Orðstýrari:** | **Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri** |

**Ráðstevnan er almenn, øll eru vælkomin**

**Ráðstevnan er stuðlað av Norðurlandahúsinum og Føroya Banka**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

FØROYA FELAG MÓTI KRABBAMEINI

## Søkt verður eftir fólki til skaða- og tryggingardeildina

Starvið er í høvuðsheitinum at sýna skaðar á akfør og farm.
Eisini skal viðkomandi gera upp og hava eftirlit við møguligum umvælingum av skaðum.

Ert tú miðvís/ur, arbeiðssom/samur, tolin, hevur útbúgving og royndir í at sýna og umvæla skaðar, í góðum árum og ynskir at hoyra meira um starvið, so skriva nøkur orð um teg sjálvan og fá eina samrøðu við okkum.
Alt verður viðgjørt í trúnaði.

Umsóknarfreistin er 12. september 2002.

**SMYRIL LINE**
att.: stjórnin
Postboks 370
FO-110 Tórshavn

## Fólk til sølubúðina

**Sjálvsognarstovnurin Alv søkir eftir einum fólki uml. 1/2 tíð, til sølubúðina á Vaglinum, Tórshavn.**

Starvið verður at byrja 1. oktober 2002 ella skjótast gjørligt.

**Vit síggja fegin at tú hevur:**
- Áhuga og royndir í at standa í handli.
- Dugir at tosa danskt, enskt og helst eisini týskt.
- Ert fyrikomandi og sjálvstøðugur.

Av tí at vit selja heimagjørdar vørur, er ynskiligt at umsøkjarin hevur kunnleika til handgjørdar vørur.

Meira fæst at vita við at venda sær til Kristinu Larsen, tlf 211135.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 20. september 2002.

**Sjálvsognarstovnurin Alv**
Boks 301
110 Tórshavn

## Nýggj klæði

Nógv nýggj fitnessklæði av merkinum Pure Lime eru heimkomin.

**Fragd og Fimi**
Dj. í Geilsgøta 5
FO-100 Tórshavn
Tel. 31 71 00 · Fax. 31 71 00
e-mail: info@fragdogfimi.com

## FARTELEFONIR & BREITT ÚRVÆL AV TILHOYRI




**Storno** Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045